Fróðskaparsetur Føroya

1. apríl 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 3/2005

Tíð: Hósdagin 31. mars 2005, kl. 14.00-16.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

## Dagsskrá:

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 2/2005 setursráðsfundi 24. februar 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

## Mál at taka støðu til / umrøða:

3. **Reglur fyri innskriving til ph.d.-verju eftir grein 5 í Kunngerð nr. 105 frá 17. juli 1996 um Ph.D.-lestur á Fróðskaparsetri Føroya.** (J.nr. 0040-01575). *Fundarskjal: Notat frá setursskrivaranum, dagfest 7.3.2005, 2 s.* Setursráðið tók undir við niðurstøðunum í notatinum. Ráðið samtykti, at adjunktar í starvi á Setrinum sum meginregla ikki eiga at verja sínar ritgerðir á Setrinum. Setursráðið er samt um, at fyri at ganga eini umsókn á møti um verju eftir § 5, skal ritgerðarevnið liggja so nær einum granskingarøki á Setrinum, at ein lektari/professari, í føstum starvi ella adjungaraður, skal kunna meta um fakliga støði á ritgerðini. Ritgerðin eigur fyrst at vera gjøgnumlisin innanhýsis av lektaranum/professaranum á økinum. Verður hon mett at lúka neyðugu formkrøvini og annars at halda faklig mát, skal hon sendast til forhondsmetingar hjá serkønum, sum Setrið hevur sambandi við gjøgnum formligar samstarvsavtalur ella umvegis persónligt kennskap. Verður ritgerðin her mett at vera í lagi fakliga, verður umsóknin gingin á møti. Síðani verður vanliga mannagongdin fyri Ph.D. verjur fylgd.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

4. **Undirvísingarhølisviðurskifti. Avtalan við Sjómansskúlan gongur út 31.8.05, og útlit eru ikki fyri, at hon kann endurnýggjast.** (J.nr. 0030-00398). Setursskrivarin kunnaði um málið, sum verður viðgjørt í Mentamálaráðnum í løtuni. Fundur verður um málið í komandi viku millum Sjómansskúlan, Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið.

5. **Umboð fyri Fróðskaparsetrið veljast til ráðgevandi ráðið fyri Altjóða Skrivstovuna. Verandi umboð Knud Simonsen sigur seg frá.** (J.nr. 0011-00388). Ráðið samtykti at heita á Zakarias S. Hansen um at taka við í ráðnum.

6. **Uppskot til broytingar í valreglunum fyri Fróðskaparsetur Føroya.** (J.nr. 0010-00511). *Uppskot frá arbeiðsbólki, dagfest 11.2.2005, 5 s.* Uppskotið samtykt.

7. **Uppskot til *Felags leiðreglur fyri starvsfólk og lesandi fyri brúk av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya* og *Reglur um brúk av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya*.** (J.nr. 0038-01573). *Fundarskjal: Uppskot frá KT-tænastuni,dagfest 16.3.2005, 3 s. og 3 s.* Setursráðið samt um, at neyðugt er við reglum sum skjótast. Reglurnar eru kravdar bæði av trygdar- og fíggjarávum. Ivamál vóru um onkrar orðingar og ásetingar. Semja um at KT-tænastan og SSS arbeiða víðari við málinum saman við áhugaðum á deildunum. KT-tænastan og SSS skipa fyri kunnandi fundi sum skjótast um bakgrundina fyri leiðreglunum og praktisku avleiðingunum av hesum.

8. **Uppskot um broyting av próvdómarasamsýningum.** (J.nr. 0015-01010). *Fundarskjal: Uppskot, dagfest 22.3.2005, 2 s.* Setursráðið helt at ásetingar um leysalærarar skulu vera í reglum fyri seg. Onkrar broytingar neyðugar. SSS rættar til og sendir setursráðnum til samtyktar millum funda.

9. **Um- og uppíbygging í Starvsstovuhúsini.** (J.nr. 0039-01574). SSS sent Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fyribils svar. SSS biður um fund við Mentamálaráðið og hinar partarnar um málið.

10. **Fróðskaparsetrið velur lim í M.A. Jacobsens virðislønarnevndina fyri tíðarskeiðið 2005-2009. Anna Maria Fosaa hevur borið seg undan.** (J.nr. 0011-01535). Heitt verður á Turið Sigurðardóttir um at umboða Setrið í nevndini.

**11. Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 2.3.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 15.3.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

c. **KT-**felagið havt fund við Mentamálaráðið um KT á Setrinum. Hans Pauli Joensen kunnaði um fund, sum hann varð boðin við til 18.3.2005. KT-felagið tikið stig til fundin. Kanska møguleiki fyri at fáa pening til KT í 2005. Niðurstøðan á fundinum var, at Setrið skuldi gera uppskot til arbeiðsætlan fyri KT útbúgving og gransking.

**Avgreiðslumál:**

**12. Góðskrivingar:**

**a. Føroyamálsdeildin mælir til hesar góðskrivingar:**

1. **Hanna Jensen fær Nordliks-skeiðið "Nye studier i Nordisk Poesi", sum hon hevur tikið við Syddansk Universitet, góðskrivað sum 10 ECTS í cand.phil.-lestrinum.** (J.nr. 0046-01571).
2. **Maiken S. Poulsen Englund fær skeiðini *Kommunikation, Organisation, Lärande i Arbetslivet* og *Praktisk retorik*, sum hon hevur tikið við Stockholms Universitet, góðskrivað sum 40 ECTS í cand.phil.-lestrinum.** (J.nr. 0046-01572).

**b. Søgu og Samfelagsdeildin mælir til hesa góðskriving: Páll Holm Johannesen fær skeiðið *Projekt U-lande i WTO 19,2 ECTS,* sum hann hevur tikið við Roskilde Universitetscenter, góðskrivað fyri *Altjóða politikk og altjóða skipan 15 ECTS* í B.S.Sc.-lestrinum <u>og</u> skeiðini *Videregående politologi 5,4 ECTS, Globalisering og overlevelse 5,4 ECTS, Videregående økonomi 5,4 ECTS, Regional planlægning, erhvervspolitik og forvaltning2,4 ECTS* og *Kvalitative og kvantitative metodeteknikker 2,4 ECTS,* somuleiðis frá Roskilde Universitetscenter, góðskrivað sum 25 ECTS í B.S.Sc.-lestrinum saman við avlopinum frá verkætlanini um menningarlond.** (J.nr. 0046-01235).

Góðkent.

**13. Námsferðarstuðul 2005.** (J.nr. 0071-01392). *Fundarskjal: Uppskot frá SSS, dagfest 31.3.2005, 1 s.* Uppskotið samtykt. SSS avgreiðir málið.

14. **Próvdómaragóðkenning. Søgu- og Samfelagsdeildin hevur biðið Mentamálaráðið um góðkenning av Hans Jacob Joensen sum próvdómara í *Søgu*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**Kunningarmál:**

**15. Mánaðarjavnar:**

a. **Ultimo desember 2004, 2. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt setrið 18.358.700 kr = 100% av játtanarkarmi uppá 18.358.000 kr.** (J.nr. 0015-01111).
b. **Ultimo februar 2005, nýtsla fyri alt setrið 2.604.900 kr = 13,7% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

16. **Kanadiski sendimaðurin í Keypmannahavn, Fredericka Gregory, vitjaði Fróðskaparsetrið og Altjóða Skrivstovuna 11. mars 2005. Bókagáva frá sendimanninum: The Geography of the Canadian North, Robert M. Bone – Canada and the Idea of North, Sherrill E. Grace – Ancient People of the Arctic, Robert McGhee – The Arctic Grail, Pierrre Berton.** (J.nr. 0019-0157x).

17. **Telduvørðurin hevur sagt seg úr starvi pr 31.3.05. Søkt er eftir nýggjum telduvørði, freist at søkja er 30. mars.** (J.nr. 0023-01440 og 0021-01570).

18. **Ráðstevnur:**
a. **Seminar 3.-4.6.05 í Keypmannahavn "Ja eller Nei: Folkeavstemningens dynamikk", fyrireikarar: Nils Klim Prisen ved Ludvig Holbergs Mindefond, Fondet for Dansk-Norsk Samarbejde og The Amsterdam School of Communications Research.** (J.nr. 0057-00155).
b. **Ráðstevna í Sandefjord 8.-10.9.05 "Second Symposium on Whaling and History", The Whaling Museum, Sandefjord.** (J.nr. 0057-00155).
c. **NUAS/NUS seminar 4.-5.10.05 í Karlstad "The role of higher educaton institutions in regional development".** (J.nr. 0014-01577).

19. **Útgávur:**

a. **Labour Market Services in the Nordic Periphery. A joint research project carried out by the University of Akureyri Research Institute and the University of the Faroe Islands (Elín Aradóttir, Randi Frederiksberg, Grétar Þór Eyþórsson, Jógvan Mørkøre), Norðurlandaráðharraráðið 2004.**
b. **Eyðvinur, heiðursrit til Eyðun Andreassen. Ritstjórn: Malan Marnersdóttir, Jens Cramer og Anfinnur Johansen. Føroya Fróðskaparfelag 2005.**
c. **Public Service Review: Nordic States Winter 2004, PSCA International Ltd., UK.**
d. **Viden i spil, Rektorkollegiets oplæg om forskningskommunikation. Rektorkollegiet 2005.**
e. **Frá Umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni: Impacts of a Warming Arctic, Cambridge University Press 2004.**
f. **Ársroknskapur 2004, Føroya Sparikassi.**
g. **Ársfrágreiðing 2004, Menningarstovan.**

Frágreiðing: Annika Sølvará